Jørn Astrup Hansen:

# Skilagott at velja fólk uttanífrá

BÚSKAPARRÁÐ
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Jørn Astrup Hansen, fyrrverandi stjóra í Føroya Banka er bæði fegin um og errin av, at landsstýrið hevur gjørt av at gera hann til lim í Búskaparráðnum. Hann tekur tað sum ein heiður at fáa slíka álitisuppgávu. Hetta er tó ikki fyrstu ferð, at hann hevur fingið slíka áheitan. Tað eru 4-5 ár síðani, at hann fekk sama tilboð, men tá helt hann tað ikki vera sameiniligt við at vera stjóri í bankanum eisini. Nú hann er sín egni maður og óheftur heldur hann støðuna vera øðrvísi og hevur tikið av tilboðnum.

Hann sær tað ikki sum nakran trupulleika, at hann ikki býr fast í Føroyum. -Eg havi drúgvar royndir frá mínum meira enn 12 árum í Føroyum, so eg skuldi havt tað neyðuga innlitið í føroyska samfelagið og viðurskiftini her. Jørn Astrup Hansen er annars eitt sindur kløkkur av, at hann fekk hetta tilboðið, tí hann jú býr uttanfyri Føroyar. Hetta hevur heldur ikki verið siður. Men hann heldur sjálvur, at tað varð skeivt á sinni at vraka Ráðgevanda Nevndina í Danmark viðvíkjandi Føroyum. Nú landsstýrið so hevur gjørt av at heita á seg um at vera partur av Búskaparráðnum heldur hann tað vera eina spennandi og skilagóða roynd, nevniliga hetta at taka fólk uttanfyri Føroyar við í Ráðið.

- Tað var stórt spell fyri Føroyar, at Ráðgevandi Nevndin varð niðurløgd. Frágreiðingar hennara vórðu brúktar alt ov lítið bæði í Føroyum og í Danmark. Føroyska búskaparráðið hevur síðani tikið yvir men hevur havt torført við at fáa sama status sum Ráðgevandi Nevndin. Og tá man nú slepti Ráðgevandi Nevndini so átti man eisini at havt styrkt um Búskaparráðið, og ein máti vildi nettupp verið at tikið við fólk uttanífrá, sum ikki á nakran hátt eru bundin av føroysku skipanini. Flestu limirnir í Búskaparráðnum fáa uttan iva løn sína frá tí almenna.

Jørn Astrup Hansen sigur, at tað eru støður, har tað kann vera skilagott at brúka fólk uttanífrá av ótta fyri vandanum, at "man går til i hensynsfuldhed", sum hann málber seg.

- Men metir tú teg at hava nógv at geva í slíkum starvi?

- Tað haldi eg. Eftir 12-13 ár í Føroyum havi eg fingið innlit í føroysk viðurskifti, kanska meira enn tey flestu, tí eg havi umsitið eitt so týðandi starv í samfelagnum. Eg eri ikki bundin av nøkrum, og tað havi eg heldur ongantíð verið. Eg meti meg vera o-



bjektivt óheftan av tí føroysku skipanini. Eg haldi, at mín persónligi integritetur er í lagi. Men tað er greitt, at tað eg eri farin úr Føroyum, ger, at eg miss nakað av tí tætta kenskapinum. Hann ætlar sær kortini at vitja oftani.

Hann heldur tað tó ikki nýtist at vera nakar vansi heldur at búgva aðrastaðni og vísir her til Ráðgevandi Nevndina, sum jú bara vitjaði her av og á men hvørs frágreiðingar ikki liggja nakað aftanfyri tær hjá Búskaparráðnum.

- Ráðgevandi Nevndin nýttist ikki at taka hensyn, nakað, sum ger seg alt ov nógv galdandi í Føroyum. Eg haldi tó, at Búskaparráðið hesi seinastu árini hevur torað at úttalað seg rættiliga nógv men er samtíðis tíverri ikki tikið nóg nógv fyri fult. Man hevur ikki lurtað nóg nógv eftir tí. Jørn Astrup kemur til Føroya miðskeiðis í januar at vera við á eini ráðstevnu.

# Fimm nýggj andlit

**– Tað eru hevur verið stór útskifting, nú nýtt búskaparráð varð valt í morgun**

BÚSKAPARRÁÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur nú valt nýtt búskaparráð. Og tað skerst ikki burtur, at tað hevur verið stór útskifting í ráðnum.

Heilir fimm av teimum sjey limunum í nýggja búskaparráðnum eru nývaldir.

Hetta Búskaparráðið er valt eftir sama leisti, sum undanfarin ráð.

Tað hevur annars nógv verið tosað um at broyta Búskaparráðið. Báðir teir undanfarnu formenninir róðu framundir at avtaka ráðið heilt og ístaðin fyri skipa fyri eini búskaparráðstevnu.

Onnur hava skotið upp at velja útlendingar í ráðið, sum kundi síggja føroyskan búskap við nýggjum brillum.

– Búskaparráðið verður valt eftir eini lóg og so leingi hon ikki er broytt, verður ráðið heldur ikki broytt og tí er tað valt eftir sama leisti sum undanfarin ráð, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður.

Tað er setursráðið á Fróðskaparsetrinum, sum gevur landsstýrismanninum eina innstilling við einum lista við fólki á, sum hann síðani velur ráðið burturúr.

Og skulu vit tosa um útlendingar, eru tað kanska summi, ið hava hug at seta gamla Føroya Bankastjóran, Jørn Astrup Hansen í tann bólkin.

– Tað er ein spurningur um hann er útlendingur. Í mínum eygum er hann minst líka nógv føroyingur. Hann er í hvussu so er ein, ið kennir føroyskan búskap so væl sum fá onnur, sigur Bárður Nielsen.

– Hann er samstundis ein frálíkur viðmerkjari í almenna samfelagskjakinum og eg haldi tískil, at tað er sera heppið, at varðveita hann í almenna kjakinum. Men so er eisini neyðugt, at hann hevur ein pall at kjakast útfrá, leggur landsstýrismaðurin afturat.

Hann helt tí, at tað var sjálvsagt at taka av, tá ið Astrup Hansen var ein møguleiki til ráðið.

Annars fegnast hann um, at tað aftur hesuferð hevur eydnast at manna ráðið við sera vælskikkaðum fólki, tí tað eru mong, sum bera seg undan.

Sjálvir ivast Bárður Nielsen, í um tað er rætt at avtaka Búsksparráðið.

– Sjálvt um vit skipa fyri eini búskparráðstevnu, skal ein slík ráðstevna hava eitt útgangsstøðið at kjakast útfrá. Tí mugu vit hava ein grundvøll, sum fyrireikar eina slíka stevnu. Sostatt dugi eg ikki at síggja, at Búskaparráðið kann takast av uttan so at okkurt kemur ístaðin, sigur Bàrður Nielsen.

Nýggja búsksparráðið tekur við 1. februar í ár og tað situr til 31. desember í 2008.

## Nýtt búskaparráð

Sum sagt, eru tað fimm nývaldir limir í nýggja Búsksparráðnum og tey, sum hugsa um javnstøðu, hava heldur ikki nógv at fýlast á, tí tað eru tríggjar kvinnur og fýra menn nýggja ráðnum.

Nýggja búsksparráðið er soleiðis mannað:

Elisabeth Eldevig Olsen, fiskivinnufrøðingur, Fuglafjørður (nývald)

Durita Tausen, cand. scient. oecon, Tórshavn (nývald)

Jørn Astrup Hansen, cand. oecon, Keypmanhavn (nývaldur)

Magni Laksáfoss, cand. Polit, Streymnes

Poul Geert Hansen, cand. polit, MPA, Tórshavn

Rúna Hjelm, fiskivinnufrøðingur,Tórshavn (nývald)

Zvonko Mrdalo, MA og MSc í Economics, Skála (nývaldur)

Ráðið skipar seg sjálvt við formanni.

# Størsta útstykking í Suðuroy í nógv ár

**Byggimeistari á Tvøroyri fer nú undir stóra útstykking, har hann bjóðar fólki byggibúgvin grundstykki, sum eisini verða friðað fyri seyði**

ÚTSTYKKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú verður farið undir eina ta størstu útstykkingina av grundstykkjum í Suðuroy í mong ár.

Tað er Petur Hammer, byggimeistari á Tvøroyri, sum tekur stig til hesa útstykkingina, og hetta verður samstundis fyrstu ferð, at privata initiativið í Suðuroy tekur stig til so stóra útstykking á sama hátt, sum kent er aðrastaðni í landinum.

Tað hevur annars mangan verið nógv tosað um, hvussu illa suðuroyggin er fyri, bæði viðvíkjandi arbeiðsplássum og fólkatali, men Petur Hammer er so mikið bjartskygdur um støðuna, at hann nú ætlar sær undir eina stóra útstykking úti í Heiðunum í Froðba.

Væntandi verða upp ímóti 20 grundstykki í hesi eini útstykkingini.

– Vit ætla at gera grundstykkini púra byggibúgvin, so tá ið tey verða keypt, er púra klárt at seta formarnar upp, sigur Petur Hammer.

Samstundis verður alt gjørt og lagt til stykkið, sum hoyrir til eina útstykking nú á døgum, bæði vegir, kloakkir og gøtuljós, streymur og telefonkaðal.

Ætlanin er eisini at tey, sum keypa grundstykki, skulu fáa frið fyri seyði, tí ætlanin er at gyrða alt økið inni og at hava eina felags innkoyring við rulluportrið í.

– Tað merkir so, at tað er ikki neyðugt hjá hvørjum einstøkum húsaeigara at gera dýrar gyrðingar rundanum húsini fyri at fáa frið fyri seyði í túninum.

Grundstykkini verða ymisk í støðd, men felags fyri tey øll er, at tey eruy hampiliga stór. Eftir tí, sum nú liggur í kortunum, koma tey at vera ímillum slakar 500 fermetrar upp í 800 fermetrar, men bæði stødd og talið á grundstykkjum, kann broytast eitt sindur, tá ið tað er endaliga teknað.

Av tí, at grundstykkini eru byggiklár, við øllum hentleikum, tá ið tey verða seld, fer tað sjálvsagt at síggjast aftur í prísinum, men Petur Hammer torir ikki enn at seta nakran prís á.

Men hann heldur, at tað kann ofta geva eina skeiva mynd av prísinum, tá ið fólk keypa ein stykkið, sum ikki er byggibúgvið fyri bíligan penga.

– Tað kostar ógvuliga nógv at gera eitt stykkið púra klárt at byggja á, bæði útgrevstur, útfylling, kloakk og annað. So tá ið tað er klárt at seta formarnar á, kostar tað mangan meir enn væntað, umframt at tað krevur nógva orku.

– Tá ið fólk fáa eitt byggibúgvið grundstykkið, er tað bæði hugaligari at fara í holt við at byggja og eisini nógv lættari at hava tamarhald á byggiprísinum og tað átti at verið ein stórur fyrimunur.

Nú er tað onki dulsmál, at Petur Hammer er sjálvur timburmeistari, men hann leggur dent á, at tað er onginin treyt at fólk eisini keypa húsini frá honum.

Men er áhugið fyri tí, er hann sjálvsagt til reiðar at byggja húsini eisini og at levera tey, antin klár at flyta inn í, ella bara innilokað, ella eftir ynski annars.

Petur Hammer sigur, at gongur sum ætlað, verða grundstykkini klár um eitt ár ella so.

Hann vónar nú at koma í eitt jaligt samskifti við kommununa og byggimyndugleikar um vegir, kloakkir o.s.fr.

Hann vónar nú, at hetta fær undirtøku, tí hetta er so ein roynd at gera eina veruliga útstykking í Suðuroy, soleiðis sum vit kenna tað aðrastaðni frá



*Tað er her á hesari fløtuni í Froðba, niðanfyri høllina vinstrumegin í myndini, at ein stór útstykking nú skal gerast við fleiri byggiklárum grundstykkjum*